# Hald jól við James Bond

**Eingin jólamánaði uttan stórfilm á hvíta tjaldinum. Í ár verður tað filmurin um James Bond, sum lokkar flest fólk í biohøllirnar**

Tað eru liðin fleiri ártíggjund, síðani James Bond fyrstu ferð sást á hvíta tjaldinum, og hóast filmarnir næstan eru blivnir endaleysir um tann bretska superagentin, so hava fólk framvegis hug at síggja ævintýrini hjá 007.

Undan vikuskiftinum var nýggi filmurin um James Bond frumsýndur kring heimin, og fólk í hópatali leitaðu sær í biohøllirnar.

Undan frumsýningini hevur filmurin verið ummældur í alskyns bløðum og tíðarritum, og ummælini eru á einum máli um, at her er talan um ein tann besta James Bond-filmin nakrantíð. Nógva og góða umrøðan sæst eisini aftur í, at óvanliga nógv fólk hava keypt atgongumerki til filmin beinanvegin.

Tá ið næstseinasta James Bond-filmurin varð sýndur í 2002, merktu framleiðararnir ein dalandi áhuga fyri Bond. Nú er sum vent í holuni, og við einum nýggjum sjónleikara í leiklutinum sum Bond, tykjast agent-filmarnir aftur at eiga nógv ár fyri framman.

Daniel Craig er nýggi James Bond, og tað eru fleiri, sum halda, at hann er besti James Bond nakrantíð – eisini betur enn Sean Connery, sum hevur verið mettu sum tann rætti 007.




Havnar Bio frumsýnir eisini stórfilmar, tá ið øll hini londini gera tað, og har ber nú til at stytta sær um myrku vetrarkvøldini við at hyggja eftir Casino Royale, sum nýggi James Bond-filmurin kallast.


























